# Arbeiðsark 1: ein gerandisgongutúr

**Uppgáva 1: Filma ein gerandisgongutúr**

Tit skulu filma ein gerandistúr úti. Byrji við einari brainstorming um ‘locations’ (Sum merkir stað á filmsmáli).

Fortelji hvørjum øðrum um støð, sum tit ganga um dagarnar. Tað kann t.d. verða vegurin har tú býrt, túrurin til ella frá skúla, ella eitt stað tú fert til, tá tú fært frí seinnapartin. Hvat sært tú á vegnum? Er tað vakurt ella ljótt? Er tað gott at verða har? Velji eina rutu, ið tit vilja brúka sum tykkara location. Tað kann gott verða ein ruta, sum vísur tað serstaka við tí staðið, har tit búgva.

**Reglur:**

Filmi persónin gangandi í einum ’total-stillingi’. Tann sum filmar skal ganga aftanfyri í somu rútmu sum persónurin (tað kallast ’tracking’ á filmsmáli)

Upptøkan skulu vara í 30 sekund, soleiðis at vit kunnu klippa í henni

Minnist til at tykkara lærari skal góðkenna tykkara location!

Minnist til at venda telefonini!

**Uppgáva 2: Finn mynstrini!**

Tit skulu nú taka tríggjar myndir í tí umhvørvinum, har tit hava gingið túrin. Hygg eftir litum, mynstrum og formum rundanum tykkum, og fotograferi tað vakrasta í nærmynd. Syrgi fyri at mynstri fyllir alla myndina. Tað er ikki neyðugt at síggja hvat tað er. Tað týdningarmiklasta er, at tað er eitt feitt mynstur.

**Aftur í flokkinum:**

Leggi fram tykkara upptøkur og mynstur fyri hvørjum øðrum í flokkinum. Kenna tit støðini aftur? Hvat halda tit at fólk, sum koma frá øðrum londum hugsa, tá tey síggja staðið?